Framhald av síðu 9

Ein góður máti at ferðast

Ringarnir
Seinni í dag fingu vit vitjan av gullsmiðinum. Hann hevði eitt breitt úrval av brúðarringum við. Vit vóru samd um at velja okkum ringar, gjørdir úr hvítagulli við innlagdum gulli í. Hesar ringar hevði hann ikki við. Vanliga hevði hann teir heldur ikki, so hesar ringar ger gullsmiðurin sjálvur. Hann kemur við teimum um einar 5 dagar.

Gull-kvaliteturin her í Thailandi verður ikki roknaður á sama hátt, sum eg kenni hann frá tí vestliga heiminum. Okkara ringar eru 1 bat, eitt bat er 15,2 gram! ella sagt á ein annan hátt, okkara ringar eru 18 karat hvítgull.

Av útsjónd sá gullsmiðurin rættiliga "dýrur" út. Hann kom sjálvur annar á vitjan í einum flottum BMW við navni á nummarspjøldrunum, ringum við diamantum á fingrunum, og urið var prýtt við diamantum. Tað sama var pennurin, sum hann hevði í bringulummanum, so fínt var tað í øllum førum, og tey høvdu koyrt 35 km fyri at vitja okkum. Tað er hvat man kallar persónlig "betjening".

Hotellið
02.12.07
Ætlanin fyri dagin í dag er, at vit skulu vitja Hotellið, har brúdleypið skal vera. Aftur her verður "høflighed" sett í hásæti. Kvinnan, sum hevur við okkara tiltak at gera, verður boðsend. Hon kemur berandi við tveimum stórum tjúkkum bókum, har av tann eina er gylt.

Vit verða boðin at sessast. Stutt eftir hetta kemur ein tænari við ísvatni til okkum. Ísvatnið verður "serverað" á tann hátt, at tænarin leggur seg niður á knæ og kemur síðani yvir til okkara borð við vatninum.

Vit tosa við kvinnuna um, hvat fyri rættir vit ynskja okkum. Vit ynskja at hava kinesiskan mat. Sodavatn og leskidrykkir syrgir hotellið fyri, men vín og sterkari drykkir fáa vit loyvi at koma við sjálv. Hotellið vil síðani taka sær av at servera tað.

Vit velja sjálv, hvussu veitsluhølini skulu prýðast. Í Thailandi eru tey sera bergtikin av sterkum og litríkum litum. Vit velja eina ljósareyða bakgrund við ymiskum pynti. Vit kunnu sjálvi velja tekstin, sum skal standa í bakgrundini.

Fyri uml. kr. 100, - eyka er møguleiki at fáa ein ísstoypning av ymiskum figurum. Vit velja svana. Við í tilboðnum er ein yvirnátting í einari luxus-suite. Vit verða boðin upp á ovastu hædd, har tann eksklusivi parturin av suitum er "Eksklusiv floor", og fáa høvið at síggja okkara suitu,. Og har er avgjørt einki at fílast at.

Frisør
02.12.08
Ná, í dag kom so dagurin, tá eg skal klippast. Vit fara við motorsúkkluni og koyra til eina klippustovu, sum ikki liggur so langt frá, har vit búgva.

Hóast fólk bíðað, slapp eg framat beinanvegin. Eg føldi meg eitt sindur illa, men eg havi lært, at tað skal man ikki, tí so er man óhøfligur.

Eg verði boðin at sessast, stórur ómaki verður gjørdur burturúr at fyribyrgja, at eg ikki fái hár niður millum troyggjuna og hálsin. Hetta er óivað nakað, sum vit flest hava trupulleikar av og sigast skal, at hetta er fyrstu ferð í lívi mínum, at eg ikki havi fingið eitt einasta hár niður í troyggjuna.

Síðani verði eg puddraður rundt hárkantarnir. So fer hárfríðkan í gongd. Sigast skal, at eg altíð eri sera stuttkliptur, so ikki er so nógv at gera av um man hugsar um hársnið, men hóast alt, so verður stórur ómaki gjørdur burtur mínum hári og av og á kemur barberknívurin eisini í brúk.

Tá hárfríðkan er liðug við hár mítt, verða oyruni og nøsin kannað fyri hár, og tey sum funnin verða, verða klipt burtur. Síðani verður stólurin snaraður á og eg verði lagdur niður, nú skal eg rakast "barberast". Eg verði varisliga smurdur inn í barberskúm. Tað verður smurt á við einum fingri og ikki við kusti. Hetta er sum alt annað sera makligt.

So verður byrjað við barberingini og eftir tað fáa nakkahárini o.s.f. ein túr. Alt við ógvuligari róligari hond. Tá hon er liðug við hetta, verði eg masseraður í nakkanum, hárbotninum og pannuni og so verði eg smurdur inn við barberluktilsi, sum er vundið upp í ein stóran mjúkan klút og spakuliga smurt inn í andlit mítt.

Konklusiónin av hesari vitjan er, at hetta so avgjørt var eitt upplivilsi. Eg føldi meg sum ein nýggjan mann og kostnaðurin uppá uml. kr. 12,- má sigast at vera sera bíligt.

Framhald komandi leygardag

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Gudny Langgard, Bournemouth í Onglandi, gudny78@msn.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Neyðtøkutablettin

Runt um allan heim eru trupulleikar við rúsandi evnum. Eisini í okkara lítla, friðarliga landi hava vit ymisk sløg av rúsandi evnum og ikki er trupult at fáa fatur á teimum, um ein hevur hug til tess.

Hetta er eisini ein ógvuliga stórur trupulleiki í Onglandi. Ein trupulleiki, ið einans vindur upp á seg. Her eru ógvuliga nógv ymisk sløg at fáa, bæði sterk sum minni sterk og mangan koma nýggj sløg av rúsevnum á marknaðin. Eitt tað nýggjasta og eitt ógvuliga væl umtókt rúsevni er "The rape pill" — neyðtøkutablettin. Neyðtøkutablettin er eitt ógvuliga farligt evni, ið sum oftast verður nýtt í náttklubbum. Tablettin er mest nýtt av mannfólkum, ið ynskja sær eitt konufólk, sum ein ivaleyst skilur av navninum á rúsevninum.

Neyðtøkutablettin er ein blandingur av ymiskum rúsevnum og styrkin av tablettini er tískil eisini ymisk. Meiningin við hesari farligu tablettini er tann, at fólk, ið fáa hana, blíva í ørviti, nærmast missa vitið og eru ikki klár yvir, hvat ið hendir rundan um tey. Sum sagt verður neyðtøkutablettin sum oftast nýtt í náttklubbum. Nógv ung, bæði konufólk sum mannfólk leita sær í náttklubbar fyri at dansa og fyri at hugna sær saman við teirra vinum, men tíverri eru tað onnur, ið koma fyri aðrar orsøkir. Mannfólk, ið hava tablettina, fara inn í náttklubbar fyri at neyðtaka. Teir ganga runt, møguliga dansa eitt sindur og leita eftir einum offri. Tá ið gentan er funnin, halda teir eyga við henni og tá ið hon hevur ein drykk, lirka teir spakuliga eina tablett í teirra drykk. Stutt eftir blívur henda neyðars genta í ørviti og er løtt at taka útum fyri at síðani at verða neyðtikin.

Hetta er hent fyri nógv ung í Onglandi. Tað eru ikki einans gentur, ið eru offur fyri hesa gerð — eisini dreingir kunnu koma út fyri at fáa hetta rúsevnið í teirra drykk og seinni verða neyðtiknir av monnum, ið eru samkyndir. Dagin eftir er vanligt, at persónurin, ið er neyðtikin, einki minnist av kvøldinum, frá tí, at rúsevnið var koyrt í drykkin og til viðkomandi vaknar aftur um morgunin.

Neyðtøkutablettin er ein ógvuliga stórur trupulleiki í Bournemouth, ið liggur í suður Onglandi. Persónliga kenni eg trígjar gentur og ein drong, ið hava verið útsett fyri at hava fingið neyðtøkutablettina í teirra drykk og síðani eru neyðtikin.

Tað er av ógvuliga stórum týdningi, at ung, ið fara í býin, eru klár yvir, at tað ivaleyst eru fleiri neyðtakarar, ið ganga runt við neyðtøkutablettum í teirra lummum og leita eftir einum offri ella møguliga fleiri. Um ein hevur ein drykk í hondini, má man ómøguliga fara til dømis á dansigólvið ella aðrastaðni og lata drykkin standa, fyri síðani at koma aftur og drekka úr tí sama glasinum. Eisini vita øll, at tað mangan er trongt í einum náttklubba og tá ið ein gongur runt við einum drykki í hondini er eisini lætt at lirka eina tablett í drykkin. Tískil sær man mangan, at gentur her í Bournemouth halda lógvan fyri glasið alla tíðina. Ein skuldi trúð, at um ein er varin og ansar eftir sínum drykki, kann einki henda, men soleiðis er tíverri ikki! Tað sigst, at eisini barvørðarnir, ið selja drykkir til kundarnar, til tíðir hava ein prikk við í spælinum, og tá er ikki lætt at fyribyrgja neyðtøkutablettina!

Tíbetur eru vit ikki útsett fyri tílíkum rúsevni í Føroyum, men føroyingar reisa nógv og vit eru mangan heldur góðtrúgvin, tá ið tað kemur til at stóla upp á fólk. Vit eru ikki von við, at fólk eru óerlig og okkara hugsan er til tíðir tann sama, tá ið vit fara uttan um landoddarnar. Hetta kann føra til stórar trupulleikar og hesin emailurin er tískil einans ein ávaring til teir mongu føroyingarnar, serstakliga ung, ið fara uttanlands og ikki vita um neyðtøkutablettuna.

Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan 1. mars 2003.

Uppgávan:
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verað røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið. Dentur verður lagdur á góð samstarsvevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

Setanartreytir:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið og tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmanssskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. februar 2003.

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyrironydum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.

Sløkkiliðsmenn
til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 2 leysum sløkkiliðsmonnum til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 15. februar 2003 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan og stóra koyrikortið, somuleiðis sum teir antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmonnum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsingar um størvini eru at fáa frá brunastjóranum Gordon M. Petersen á telefon 220101.

Møguligar umsóknir, ið skulu vera skrivligar, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **31. januar 2003 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 16. januar 2003
Fuglafjarðar kommuna

Starv

Handverkarar til verkstaðið

Til verkstaðið hjá Farmaleiðum, eru áhugaverd og mennandi størv sum mekanikarar leys at seta sum skjótast.

Arbeiðsuppgávurnar hjá verkstaðnum
Høvuðsuppgávan hjá verkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna viðlíkahaldið av lastbilum, trukkum, lastum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni. Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

Størvini fevna um
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, trukkar, lastir o.a. útbúnað.

Førleikakrøv
- Mekaniska útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

Setanartreytir
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir
Áhugaðir skulu senda umsóknina til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 20. januar 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Boga í Gil, verkførara, tel 343060 ella 213046. Teldupost: big@ssl.fo

Høvuðsuppgávan hjá fyri-tøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 30 - www.ssl.fo

REPROZ

FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Røgvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo

KOM OG DANSA Í PLATFORM
MÁNAKVØLDIÐ TANN 20. JANUAR

Læri m.a. Line dans við Miu Cameron og Arnfríðu Rubeksen
- James Olsen kemur sum gestur

Tiltakið verður fyri bæði gentur og dreingir frá 13 - 17 ár

kl. 19.30 - 21.30

Royk- og rúsfrítt sjálvandi

Sodavatn ella Sunkist verður eisini at fáa til keyps

KOSTNAÐURIN:
Við +Korti frá Føroya Sparikassa verður kostnaðurin kr. 25,-
40,-

Lesið meira í smálýsingunum undir "dans" í blaðnum.

Um tit hava spurningar, er møguleiki at ringja til foreldrabólkin: Sólrun 210780 · Tone 261165 · Lise 260334